FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

Fundarfrágreiðing frá lestararráðsfundi 29.01.18

**Á fundi**

Árni Jóhan Petersen, Adjunktur, formaður
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari
Jens Christian Svabo Justinussen, útbúgvingarleiðari
Ingmar Berg Mikkelsen, lesandi, skrivari
Karin Jóannesardóttir, lesandi
Emil Hermansen, lesandi (ikki møttur)
Sigrid Joensen, (sjúk)

**Frá síðsta fundi**

1. **Nýggir limir:**
   Karin Jóannesardóttir er komin í stað Inga.

2. **Góðskrivingar og annað**
   Góðskriving N.N. Masterlæra í politikki og umsiting, 30 ECTS
   Skundmál, tað var avgreitt frammanundan. Ráðið tekur undir við tí
   3 skeið sum er undangóðkend, 30 ECTS til samans, sí tilfar

   ***Góðskriving N. N. lesur Hjánám í samfelagástøði***
   Søkir um góðkenning fyri vísindaástøði við vísindaástøði frá Føroyamálsdeildini
   Sami undirvísari og líkist, men tað er bara partur av skeiði
   Háttalagspartur vantar.
   Umsókn ikki gingin á møti eftir tilmæli frá útbúgvingarleiðara

   **Góðskriving N.N. lesur Masterlæra, poltikk og umsiting, 10 stig**
   N.N. hevur ongan profil, men tað er ikki hansara skuld, tí útbúgvingarleiðarar høvdu ov nógv at gera tá. Annars eigur profilur at vera við, tí annars kann ráðið ikki taka støðu til, um tað hóskar at góðkenna
   Fyribils góðkent við teirri treyt, at profilur verður gjørdur og at tað samsvarar við profilin
   Senda aftur við profili, at fáa endaliga góðkenning.

   **Góðskriving N.N. lesur BA Søgu 5 stig á bachelor**
   Søgulesandi, søkir um góðkenning praksisskeið í projektleiðslu sum valfak.
   Erling skal tryggja at restin av skeiðslýsingini verður send formanninum

**N. N. Masterlæra politikk og umsiting**
Søkir um undangóðkenning fyri Science Diplomacy in Pracice at fellast í Politikk og umsiting
Hevur fingið undangóðkenning 5 ECTS.

**N.N. Westnordic Studies, 10 ECTS á meistara**
Undirskrift vantar frá Lau, alt skal sendast í einum pdf-skjali. Eigur at standa á heimasíðu Setursins
Hevur fingið undangóðkenning 10 ECTS.

**N. N. Masterlæra Politikk og umsiting 7,5 ECTS**
Contract Law, 7,5 stig
Undangóðkenning, var góðkent á síðsta fundi
Kommunen i det 21. århundrede, 7,5 stig
Skeiðslýsing vantaði í fjør+ Greining hjá Beintu í Jákupsstovu, 5 stig
Eitt sindur ógreitt, um greiningin (5 stig) hoyra til somu umsókn
Kommunen (7,5) er góðkent, men greiningini (5 stig) vantaði skeiðslýsing. Hon er komin nú, men tað er ikki greitt, at tað er skeið í Molde, sí niðanfyri um skeiðið "Politisk umboðan"
Góðkent við teirri treyt, at skeiðið verður broytt til at hoyra heima í Molde.

3. **Skeiðslýsingar at góðkenna**
**Historiografi**
"Fortreytir"Leggja afturat beint fyri "Stakskeið": "Valfak í søgu."
Má standa greitt um tað er krav- ella valfak í søgu.
Og "valfak í Politikki og umsiting og Sosialvísindi og samfelagsplanlegging"
Erling skal fáa boð um tað.
"Innihald"
"Støði verður tikið í grundbók" - sigur ov lítið. Kann skriva evni í staðin.
"Próvtøkuháttur"
Við ella uttan fyrireikingartíð? Skal standa "við fyrireiking"
"eftir galdandi próvtalsstiga" burtur
"Lestrarlisti"
Leggja afturat 1.000: "síður"
"Læruúrtøkur"
Ramsar bara evni, ikki nóg mikið
Men hvussu við "greina", "innlit"
Próvdómari skal kunna spyrja: dugir hin lesandi hetta?
Verður at endurskoða
Góðkent við teirri treyt, at broytingar verða gjørdar

**Corporate Finance**
Skriv frá Zvonko: skal ikki eita virkisbúskapur, bara hava enskt heiti
Ikki lætt at finna føroyskt heiti. Skeiðslýsingarinnihaldið má vera á føroyskum. Helst finna hóskandi føroyskt heiti eisini.
"Virkisbúskapur" er ikki rætta heitið
Skeiðsnummar vantar, men tí tekur skrivstovan sær av
"Læruúrtøka"
Kann við fyrimuni gerast yvirskipaðari
Skulu tey bara duga evnini, ella skulu tey duga at greiða frá ella greina, osfr.
"Læru- og undirvísingarhættir"
Ikki neyðugt við ávísum tímatali. Nóg at skriva "lectures and exercises".
"Próvtøkuháttur"
Skal standa "oral examination with preparation time"
Skeiðslýsing skal vera leiðbeinandi, men ikki ov fastlæst

Góðkent við teirri treyt, at broytingar verða gjørdar

Búskaparfrøðiskeið hava ymsa fyrireikingartíð og tað er óheppið.

**Politisk umboðan:**
Nýtt skeið
Skeiðslýsingin er ætlað tveimum lesandi. Beinta í Jákupsstovu hevur verið í ráðnum, men tá stóð onki um dátuviðgerð.
Hatta er ikki skeið á Setrinum, men á Høgskolen i Molde.Hvør býður skeiðið út? Molde ella Føroyar?Lættast um Molde býður út
Skeiðið er skal vera partur av undangóðkenning.
Tað skal ikki vera skeið á Setrinum, men í Molde, tí annars er tað ikki lestrarvist
Partur av 20 stigum uttanlands

**Økonometri:**
"Læruúrtøka" Ov greinað, ikki lætt at fáa yvirlit. Stytta og orð sum "lýsa, greina", um tað er hóskandi. Umhugsa føroyskt heiti, t.d. "búskaparkanningar", sí islex.fo.
Gott at hava bæði føroyskt og enskt í sama skjali.
"Próvtøkuháttur"
Hvat merkir "stuðulstilfar"? Telda, pensum, egin upprit, net, annað?3 tímar ov stutt?
4 tímar í makrobúskaparfrøði II, hví?
Góðkent við teirri treyt, at broytingar verða gjørdar

**Makrobúskaparfrøði 2**
"Fortreytir"Skal ikki standa "fyrimunur". Antin er tað treyt ella ikki. Skal bara standa "Staðið..."
"Endamál" Næmingar? Heldur lesandi
"Læruúrtøka"
Kanska ið so langir setningar, men kann góðkennast uttan broyting í hesum luti
Kann standa fyrst at skilja og endurgeva (ástøði) og síðan at greina støðuna, og síðan meta um støðuna, sett upp sum hjá Blumes.
Men fyri summi er tað kanska so sjálvsagt, at tað er løgið at lýsa tað út í æsir
Góðkent við teirri treyt, at broytingar verða gjørdar

**Marknaðarføring, 10 stig**
"Próvtøkuháttur"
Kann ikki standa "treyt fyri innskriving", tí sambært reglugerð SSD er næmingur innskrivaður, um hann ikki hevur boðað frá eftir 14 døgum eftir skeiðsbyrjan. Um næmingur tí ikki hevur havt framløgu, missir hann eina próvtøkuroynd.
Kann standa t.d. "treyt fyri at sleppa til próvtøku"
"Fortreytir"
Skal standa valfak fyri POL-UM og SOS-PLAN
Kann ein, sum lesur á búskaparfrøði skriva eyka síður fyri at fáa 10 stig?
Ikki sum nú er, tí tað er hvør sín skeiðslýsing
Um vild er, ber til at broyta til at tað eisini er valfak fyri búskaparfrøði]
Enskur tekstur vantar
Góðkent við teirri treyt, at broytingar verða gjørdar

4. **Ymiskt:**

Hvussu langt undan endurpróvtøku skal næmingur vita, at hon verður?
Skal vera í hóskandi tíð. Má vera tíð at fyrireika seg. Skal ikki vera neyðugt at íðka upp í óvissu, um tað verður neyðugt at fara til endurpróvtøku knappliga.
At fáa at vita mánadag, at tað verður fríggjadag, er ikki nóg gott.
Tað skal vera innan árs.
Um lesandi fellur í skeiði, er tað sjálvsagt, at tað er t at hann ikki dugir skeiðið. Tí er neyðugt við tíð at læra seg tað betur.
Búskaparfrøðiskeið hava ymsan próvtøkuform hóast líknandi uppgávu tað er óheppið.

**Lóg og reglugerð**
Setur.fo
Lóg og reglur
**Lestrarráðið**
Kann vera at ivamál stinga seg upp, tí ikki alt er skrivað í reglu og lóg
Bologna
Hátturin at gera skeiðslýsingar er úr Bologna
**Skeið**
Summi skeið broyta próvtøkuhátt í miðjari hálvu
Summir uttanhýsislærarar tálma at gera skeiðslýsingar klárar
Men slepst ikki undan tí?